# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# ALMENN KAPPINGARAVLAGING

Kringvarpið fær nú níggju milliónir eyka í inntøku, eftir at løgtingið broytti lógina um kringvarpsgjald soleiðis, at 3.000 húski – sum higartil eru sloppin undan at rinda, nú skulu rinda kringvarpsgjald. Tað er sjálvandi at fegnast um, at fíggjarliga grundarlagið undir Kringvarpinum verður bøtt – og um hesar eyka krónurnar eru pengar, sum Kringvarpið nátúrliga átti at fingið í kassan, so er tað eisini í ordan.

Men tað er ikki í ordan, at løgtingið framvegis loyvir Kringvarpinum at kappast við privatu miðlarnar á lýsingarmarknaðinum. Her fer fram ein óhugnaliga ójøvn kapping. Løgtingið loyvir Kringvarpinum at krevja inn kringvarpsskatt – samstundis sum Kringvarpið sleppur at selja lýsingar og á tann hátt at undirbjóða privatu miðlarnar, sum als ongan almennan stuðul fáa av nøkrum slag. Her fer fram ein brakandi almenn kappingaravlaging.

Tað sum undrar okkum, sum reka privat miðlavirksemi, er handlingsloysi hjá politikarunum. Fyri fleiri árum síðani samtykti løgtingið, at lýsingarnar í Kringvarpinum skuldu niðurlagast eftir fimm árum. Eftir fimm árum skuldi løgtingið tryggja fíggjarliga grundarlagið undir Kringvarpinum – uttan lýsingarinntøkur. Men einki hendir. Eingin politikari er førur fyri at skera ígjøgnum.

Tað er sama søga sum við fólkaskúlinum. Landsstýriskvinnan legði fram eitt áhugavert uppskot um rationaliseringar – sparingar, har spardi peningurin skuldi koma skúlanum til góðar. Men hvat hendir? Nú skulu glæsiligu rationaliseringarnar brúkast sum sparingar.

Nú Kringvarpið fær níggju milliónir í eykainntøku, so kundi tú hildið, at nú verða lýsingarnar »niðurlagaðar«. Men so er ikki. Tvørturímóti dubbar Kringvarpið seg í kappingini um lýsingarnar.

Tað liggur í orðinum – public service – at Kringvarpið er ein almennur tænastustovnur og ikki ein handilslig miðlafyritøka. Kringvarpið skal virka 100% óheft av øllum áhugamálum, bæði politiskum, átrúnaðarligum og ikki minst handilsligum - og á tann hátt framleiða dygdargóða kunning uttan ávirkan frá nøkrum – og ikki minst, at eingin skal kunna seta spurnartekin við journalistiska integritetin.



Hesar níggju milliónirnar fløva uttan iva í kringvarpskassanum – men ójavna og ósunna almenna kappingaravlagingin tekur kvørkratak um privatu miðlarnar. Vit mugu ikki koma har til, at vit bara hava eitt alment - lýsingafongt kringvarp, har publikum ikki veit, um tað er keypt ella selt.

## Eingin politikari er førur fyri at skera ígjøgnum

# Hví útvarpar eingin?

Í gjárkvøldið vóru fyrru hálvfinalurnar í steypakappingini í fótbólti. B36 og EB/Streymur spældu í Havn, og í Fuglafirði hittust ÍF og Víkingur. Hvørki Útvarpið ella Rás2 søgdu frá dystunum, og nógv hava spurt, hví so er – ikki minst tí útvarpsstøðirnar vanliga gera nógv burtur úr fótbóltinum.

– Vit plaga ikki at útvarpa fyrru hálvfinalurnar í steypakappingini. Tað hava vit ikki gjørt seinnu árini, og tað gjørdu vit heldur ikki hesaferð, sigur Solby Eliasen, programleiðari í Kringvarpinum.

– Hinvegin fara vit at útvarpa seinnu hálvfinalurnar, tá spenningurin er enn størri, og avgerðin fellir, sigur hon.

Stjórin á Rás2 sigur, at rásin kundi hugsa sær at útvarpa hálvfinalurnar, men at tey vilja ikki standa lið um lið við Útvarpið til somu dystir.

– Vit fáa ikki rykt út allastaðni eftir einum degi, tí vit hava ikki linjur allastaðni. Men høvdu vit vitað av í góðari tíð, at Útvarpið ikki fór at siga frá, kundu vit gjørt tað. Tí høvdu vit gjarna vilja fingið eitt samstarv, har Útvarpið segði, hvørjar dystir tey ætla at útvarpa, og hvørjar tey ikki fara at útvarpa, sigur Jonhard Hammer.

Solby Eliasen sigur, at tey fingu ein fyrispurning frá Rás2 um útvarpingina hóskvøldið, og tá svaraðu tey, at tey fóru ikki at varpa út.

– Vit hava áður tosað saman við Rás2 um útvarpingina, og tað skuldi borið til at gjørt tað frameftir eisini, sigur Solby Eliasen.

Jonhard Hammer sigur, at Rás2 fer at fylgja seinnu hálvfinalunum.

– Eg havi í morgun gjørt eina eksklusiva avtalu við Víking og EB/Streym um, at vit útvarpa seinnu hálvfinalurnar hjá teimum ímóti ávíkavist ÍF og B36, sigur Jonhard Hammer.





## Lívið er ein fløkja

SJÚRÐUR SKAALE
KJAK Á SÍÐU 12



## Kreppan í Klaksvík kann koma aftur

EYÐGUNN SAMUELSEN
KJAK Á SÍÐU 12



*Mynd: Birgir Waag Høgnesen*

# Rás2 vitjaði Elis

Í hesi vikuni sendi Rás2 av Sandoynni. Rás2 fólkini vóru víða á oynni, og tosað var við lokalfólk um ferðamøguleikar og annað virksemi í oynni. Rás2 legði eisini leiðina framvið hjá einum tí kendasta sandoyinginum í landinum, útvarpsmanninum Elis Poulsen.

Elis var fyrikomandi og blíður, og kappingarneytarnir fingu eitt gott prát í góðveðrinum í Skopun.

Á myndini síggjast Elis Poulsen, Heri Simonsen, Sjúrður Joensen og Mirjam Pætursdóttir.

# Legði fót fyri kvinnu sum ikki vildi dansa

Tað er ikki altíð, at tað spælir væl av, tá ið menn bjóða kvinnum at dansa, men ein hending frá Århus sunnukvøldið er tó rættiliga sermerkt.

Ein maður beyð eini 23 ára gamlari kvinnu at dansa á náttklubbanum Train, men kvinnan hevði ikki hug at dansa við manninum. Maðurin gjørdi ikki mætari, enn at hann legði fót fyri kvinnuna, sum datt. Og síðani sparkaði hann kvinnuna í knæið.

Kvinnan varð flutt á sjúkrahús, og har varð staðfest, at hon hevði brotið handliðið, tá ið hon datt.

**Sosialurin** Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*